# Merking av bygdagøtum

**Inngangur**

Hesin faldari er ætlaður sum ein vegleiðing til teirra, sum skulu gera ábøtur á bygdagøtum.

**Um bygdagøturnar**

Flestu gøturnar eru fyrndargamlar og somuleiðis varðarnir, og eiga teir at verða viðfarnir sum hóskar seg fyri fornminni.

**Um framferð yvirhøvur**

- Gamlir varðar eru at meta sum mentaminni,
- teir mugu tí ikki flytast ella takast burtur,
- skulu broytingar gerast á varðagøtuni, verður mælt til, at tað verður í samráð við Fornminnissavnið,
- vanligar ábøtur kunnu gerast, og grót laðast afturat fyri at halda varðarnar við líka,
- har varðar eru dotnir heilt burtur ella soknir í lendið, kunnu varðar laðast upp á sama staði ella merkt verður sum víst í hesum faldara,
- heilt nýggir varðar á fyrr ókendum staði mugu ikki laðast upp í sambandi við varðagøtur,
- har ið tørvur er á merking, kann onnur merking nýtast fyri at beina fólki á varðagøturnar, sum víst í hesum faldara,
- skelti kunnu setast upp, har gøtan byrjar, møguliga við faldarum, sum kunnu takast við á gonguferðini.

**Vavi av merking**

Yvirhøvur skal skeltast sum minst, tað vil siga, at bert eigur at skeltast, har tørvur er á tí.
Fyrst og fremst eiga tær gøtur at merkjast, har nógv fólk ganga.
Ikki allar gøtur eiga at verða merktar, summar eiga at fáa frið.

**Skipan av arbeiðinum**

Skotið verður upp, at arbeiðið verður skipað í samstarvi millum kommunur, bygdasøvn og onnur áhugaði, so sum kunningarstovur, gongufeløg og onnur frítíðarfeløg.
Tað er av týdningi at hava staðarkend fólk við, eitt nú bóndir ella røktingarmenn.

**Kunning um bygdagøtur**

Á bygda- ella býartalvu eigur at verða víst, hvar bygdagøtur ganga. Merkt kann vera á korti, hvar bygdagøtan av álvara byrjar, og hvagar hon gongur.

**Hvar bygdagøtutalva eigur at setast**

Eitt gott stað at seta bygdagøtutalvuna er, har roknað verður við, at fólk byrja túrin. Hetta kann vera tætt við eitt busssteðgipláss ella ein dvalarvika ella parkeringspláss.



Varði á bygdagøtuni millum Skálabotn og Selatrað. Mynd: Petur Martin Petersen

**Bygdagøtur í bygdum øki**

Tá bygdir og býir vaksa, kemur gamla bygdagøtan fyri ein part at ganga inni í bygdum øki.
Best er, um uppruna slóðin av bygdagøtuni verður varðveitt. Hetta kann gerast við at lata bygdagøtuna vera partur av fríøkjum.
Hetta vil eisini skapa eina rás úr miðjum býi ella bygd, sum ger tað lætt at vísa fólki á bygdagøtuna.

**Portur**

Alla staðni har bygdagøta fer gjøgnum girðingar og stik skal portur vera. Stigi um stik kann einans nýtast sum eyka møguleiki at sleppa um stik uttanfyri bygdagøtuna.
Portur eiga at vera gjørd við yvirliggjara, so tað burturfrá sæst, at her slepst gjøgnum girðingina.

**Ross og bygdagøtur**

Ein trupulleiki stendst summa staðni av sliti av rossum. Har rossaferðsla er, er tað tí av týdningi at regluligt viðlíkahald er av gøtuni. Hetta er serliga neyðugt við hagaportrini, har skjótt kann gerast illgongt. Hetta kundi eisini verið hjálpt um við at gera serligar gøtur til reiðfólkið, og at lata serlig portur vera til hetta.

**Hvørji loyvi krevjast**

Øll merking fram við landsvegi skal góðkennast av landsverkfrøðinginum.
Onnur loyvi kunnu vera neyðug, eitt nú frá náttúrufriðingarmyndugleika.

**Lógarávísing**

Løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986:
§1, 3. stk. Tað er skylda hjá alment stuðlaðum bygdasavni at halda viðlíka varðar millum bygdir innan virkisøki sítt. Útreiðslur, sum standast av hesum, verða fult endurgoldnar úr avvarðandi kommunukassa, smb. reglugerð frá 29. oktober 1940.
§ 3, 1. stk. Landsantikvarurin hevur eftirlit við bygdasøvnum og veitir teimum hjálp og leiðbeining.

**Neyvari kunning**

Annars kann vísast til frágreiðingina Skelting, nátt- og tvátthús, dvalarvikar og tjalding frá 2001 og til Sniðhandbók Skelti frá 2003, sum Ferðaráð Føroya hevur givið út, og sum eru tøkar hjá kommunum og kunningarstovum.

Eisini kann hjálp og vegleiðing fáast frá Ferðaráði Føroya, Føroya Fornminnissavni og Tórálvi Weihe

**Lagt til rættis:**

Tórálvur Weihe
Arkitektur AF/MAA
Hellutún 1
100 Tórshavn

Tlf 214343

toralvur@post.olivant.fo

Faldarin er gjørdur í samstarvi við

Føroya Fornminnissavn
Kúrdalsvegur 2
Postsmoga 1155
110 Tórshavn

Tlf 310700

**Útgevari:**

Ferðaráð Føroya
Undir Bryggjubakka 17
Postsmoga 118
110 Tórshavn

Tlf 316055

tourist@tourist.fo

www.tourist.fo

Juni 2003

Faroe Islands







Nummur á tekningunum omanfyri vísa til sløgini av talvum, skeltum og pelum, ið verða nýtt, og sum víst eru við dømum niðanfyri.

Skipað er fyri felags framleiðslu av talvum, skeltum og pelum. Nærri upplýsingar um hetta fæst við at venda sær til Tórálv Weihe (adressa er á baksíðuni).




1) Bygdagøtutalva
Til nýtslu innangarðs ella har farast kann av landsvegi á bygdagøtu

2a) Bygdagøtuskelti 2b) Bygdagøtuskelti
Til nýtslu innangarðs ella har farast kann av landsvegi á bygdagøtu

3a) Peli 3b) Peli
Til nýtslu innangarðs ella har farast kann av landsvegi á bygdagøtu

4a) Peli 4b) Peli 4c) Peli
Til nýtslu í haganum. Til dømis har bygdagøtur krossast, ella har ein bygdagøta býtir seg sundur, har ov langt er millum varðar, ella har víst verður á ein stíggj

5) Peli
Til nýtslu í haganum. Til dømis har neyðugt er at halda seg beint á slóðini, fyri ikki at ganga seg í óføri